## VIÐMERKINGAR

# Miðstaðarøkið, Landssjúkrahúsið og Jógvan við Keldu

**Jónfinn Olsen**
*formaður í Ufm.*



Eg ætli mær ikki at kjakast við teg Jógvan, men eitt skalt tú gera tær púra greitt, og tað er, at miðstaðarøki sær út sum tað ger og so nógv er miðsavna. Hetta er ikki feilurin hjá Havnar Kommunu eina, men tí politiska arbeiðinum, sum hevur verið í hesum landi seinastu nógvu árini, "og sum tú ella tín flokkur millum annað hevur verið partur av".

Tað, tú skalt gera, er at taka støðu til hvørjum beini tú skalt standa á, landsbeininum og tæna øllum landsins borgarum, ella kommunubeininum og tæna borgarunum í Klaksvík. Tú kannst ikki vera í báðum støðum ísenn, sum tað sær út. Vel annað, so vit vita hvar tú ert "heilhjartaður", tí tað er ikki gott at brúka løgtingssessin til fyrimun fyri ein einstakan bý, og eingin so fær ágóðan ("tí man roynir at sindra nakað (Landssjúkrahúsið), fyri sjálvur at fáa nakað og allíkavæl vera verri stillaður"). "Tú hevur millum annað borið fram, at trupulleikin er munandi størri aðrastaðni" (eg veit ikki um tú sipar til Klaksvíkina). Um so er má eg spyrja, hvussu kann trupulleikin á hesum øki, vera størri millum annað í Klaksvík, tá tit hava 150 børn á bíðilista og Havnar Kommuna hevur uml. 400 børn á bíðilista, livst so spyrts.

Nøkur punktir vit mega gera okkum púra greið

1. Sannlíkt er, at vit føroyingar hava fleiri trupulleikar, og ein av teimum er BARNAANSINGIN á Landssjúkrahúsinum. Hendan trupulleika mega vit loysa (sum eg áður havi víst á í bløðunum um barnagarðin á Landssjúkrahúsinum), tá vit (føroyska tjóðin) nú hava skapt trupulleikan ("við millum annað yvir longri tíð at miðsavna so nógv, og hetta er eisini gjørt politiskt Jógvan"). Tá vit so hava loyst henda trupulleikan, lat okkum so ansa eftir, at vit ikki enda í tílíkari støðu aftur, men hugsa um at hyggja eftir samfelagnum sum heild ("á landsplani").

   Hesin trupulleiki um miðsavnan hevði nokk ikki verðir so stórur, um miðspjaðingin sum MIÐFLOKKURIN tosar um í stevnuskrá síni, hevði verði framdur í verki.

   Men Jógvan, lat verða við bara at harta Havnar Kommunu fyri, at allir hesir almennu stovnar og fyrisitingar eru lagdir í Havn. Spyr fyrst hvør hevur verið við til at avgjørt hetta. Tað er neyvan Havnar Kommuna, sum hevur avgjørt at almennar fyrisitingar og stovnar skulu liggja í Havn.

2. Lat okkum eisini ansa eftir, at vit hava eitt Landssjúkrahús við væl útbúnum og kvalifiseraðum læknum og sjúkrasystrum, og at tað er attraktivt hjá teimum at koma hendavegin at arbeiða á okkara sjúkrahúsum. Hetta vil eisini vera gott fyri hini bæði sjúkrahúsini í Føroyum.

3. Lat okkum eisini ansa eftir, at tey sjúku, veiku og í heilatikið teimum sum hava tørv á heilsuverkinum sum heild í hesum landinum ikki líða undir einum "politiskum maktkampi um lokalt og ærukent stríð".

Eg vil enda við at siga, STUÐLI MIÐFLOKKINUM til komandi løgtingsval, vit hava í stevnuskrá okkara, og sum eg havi nevnt fyrr í fjølmiðlunum, at øllum borgarum landsins eigur tilboð um góða heilsu- og sjúkrarøkt at standa í boði.

MIÐFLOKKURIN vil vera við til at loysa hesa støðu, og virka fyri, at heilsuverkið og verandi sjúkrahús skulu fáast at virka sum ein eind og útbyggjast samsvarandi hesum, og hetta er júst tað vit eisini siga í stevnuskrá okkara.

MIÐFLOKKURIN, TÍN RØDD Á LØGTINGIÐ. Vel tí rætt.

---

Løgtingið steðgar óræ ttvísari skattalóg:

# Hvat við at broyta eina óræ ttvísa ferðslulóg?

Fríggjadagin 15. februar steðgaðu løgtingsmenn í evstu løtu einari óræ ttvísari skattalóg. Tað er alla æru vert, at løgtingsfólk steðga einari óræ ttvísari løgtingslóg, alt gott um tað. Men hvat við at broytt eina tí mest óræ ttvísu lógina sitandi løgting - ótilvitað - hevur samtykt 32-0, nevnliga óræ ttvísu ferðslulógina ið varð sett í gildið 1. juli 2000?

**Rakar mong óræ ttvíst!**

Her er ikki talan um eitt ideologiskt høgra/vinstra ella eitt samband/loysing mál! Nei! Her er talan um eina ferðslulóg ið revsar tey skeivu fólkini á ein lemjandi óræ ttvísan hátt! Mong tilkomin fólk, umframt mong fólk í besta aldri hava fingið sítt lívsvirði oyðilagt, og onnur hava fingið sítt tilverugrundarlag oyðilagt av nýggju ferðslulógini. Her er talan um bæði sambandsfólk, fólkafloksfólk, tjóðveldisfólk, javnaðarfólk, miðflokkafólk og sjálvstýrisfólk, sum eru rakt av lógargreinunum 23, 32 og 59 í ferðslulógini frá 1. juli 2000. Tey kunnu hava koyrt reiðuligt og hampuligt í 15, 20, 30, 40 upp til 50 ár. Hava ikki koyrt vilt, hava ikki koyrt rúsdrekkakoyring, og hava einki útistandandi við løgreglufólkini. Kortini skulu øll hesi revsast lemjandi hart, um bara tey hava gjørt eitt einasta menniskjaligt mistak!

**Vilja brot og óvilja brot**

Í verandi stund eru vit í Føroyum í tí grotesku støðu, at lógirnar um valdsgerðir og manndráp eru ræ ttvísari enn ferðslulógin!! Í hesum lóginum verður støða tikin til, um tað ið gjørt var, varð gjørt við óvilja ella við vilja. Tað sum verður framt sum eitt óviljað/ótilætlað lógarbrot verður revsað munandi linari enn lógarbrot sum eru framd sum viljað/tilætlað lógarbrot. 18-20 ára gamlir unglingar ið koyra 150-200 km/t tilætlað og við fríum vilja, fáa somu revsing sum fólkini, ið fremja ferðslubrot ótilætlað og við óvilja. Tey ið velja at drekka rúsdrekka, og síðani velja at fara út at koyra, fáa somu revsing, sum tey ið fremja ferðslubrot ótilætlað og við óvilja. Paragrafirnar 23, 32 og 59 í ferðslulógini leggja upp til, at tey fólk ið ikki hava planlagt, ikki ætlaðu, ikki vildu, sum ikki við vilja bróta eina víkiskyldu skulu fáa somu revsing, sum tey ið fremja upplagt ferðslubrot við fríum vilja - brot ið eru gjørd í óflýggjaskapi!

**Missa koyrikortið treytað!**

Øll hesi brot verða koyrd í ein og sama posa, og fáa somu revsing. Pól á Tvøroyri, Katrina í Miðvági, Hans í Runavík sum hava koyrt siðiligt og hampuligt í ein mansaldur, fáa somu revsing sum hasardkoyrarnir og spritbilistarnir, tey missa koyrikortið treytað! Svara tey 10 av 60 teorispurningum skeivt uppi í bileftirlitinum, missa tey koyrikortið. Og um tey varðveita koyrikortið treytað, og gera eitt líknandi meniskjasligt mistak aftrat aftaná 2 ár og 11 mánaðir, missa tey koyrikortið med alla!! Í 3 long ár mugu tey liva í óttanum!

**Hvat ynska løgreglufólkini?**

Um ræ ttarnevndin hjá løgtinginum gjørdi eina spyrjirundi millum okkara løgreglufólk, og spurdi tey: "Hvat av hesum ynska tit skal revsast harðast av hesum ferðslubrotunum? 1) Vill og ør hasardkoyring 2) Spritkoyring 3) Ferðslubrot ið eru gjørd ótilætlað/við óvilja?" Svarið hevði givið seg sjálvt! Løgtingið skal heldur geva løgreglufólkunum amboðini til at sláa hart og kontant niður á tilætlaði brot á ferðslulógina. Ein velur sjálvur at trýsta speedarin í botn, ein velur at drekka, men ein velur ikki at bróta eina víkiskyldu! Eitt samt løgting eigur eisini í hesum førinum at steðga og broyta eini óræ ttvísari lóg, sum soleiðis koyrir øll ferðslubrot í ein og sama sekk. Fyrilit verður ikki tikið til motiv og avleiðingar í núverandi ferðslulóg!

**Er Bileftirlitið yvir løgtinginum?**

Í ferðslusendingini hjá Rás 2, fríggjadagin 8. februar setti stjórin í Bileftirliti Føroya seg omanfyri løgtingið og segði: "Tað kann als ikki koma uppá tal at fáa víkiskyldisbrot uppí eina møguliga revsistigs/straffpoint-skipan fyri ferðslubrot!". So spyrja vit tykkum 32 ið eru fólkavald, eru tað tit ella Jákup Jacobsen ið avgera hvussu lógirnar her á Føroya landi skulu samtykjast? Tað er nú heldur ikki so løgið, at stjórin í bileftirlitinum ynskir at ferðslulógin skal vera verandi óbroytt. Tað gevur nevnliga bileftirlitinum nógv arbeiðið og nógva inntøku - eitt størri tilverugrundarlag - at eitt túsundtal av teoriroyndum og koyriroyndum skulu fáast frá hondini. Koyrilærarnir hava eisini stórt gagn av núverandi ferðslulóg. Øll hesi mongu tilkomnu og fólk í besta aldri, ið skulu upp um aftur mugu seta seg á skúlabonk saman við teimum 18 ára gomlu. Og tað kanska upp í 2-3 ferðir. So tað er væl skiljandi, at Bileftirlit Føroya og Koyrilærarafelagið ynska, at ferðslulógin verður verandi óbroytt, og at øll vera "javnsett" og fara upp til nýggjar teoriroyndir og koyriroyndir, so tað rungar í kassaapparatunum hjá áðurnevndu!

**Vánaligur eldra- og familjupolitikkur!**

Nógv góð tiltøk eru gjørd fyri at bøta um korini hjá okkara eldru borgarum frá Løgtingsins síðu. Men samstundis sum ein gevur teimum eldru fíggjarligar batar við høgru hond, oyðileggur man lívskvalitetin/lívsvirði hjá teimum eldru við vinstru hond, við eini so strangari ferðslulóg! Ein 70 ára gamal borgara ið hevur koyrt hampuligt í hálva øld, hevur ikki ein livandi møguleika at standa teoriroyndina fyrstu ferð. Og ger hann tað heldur ikki triðju ferð, so er koyrikortið farið med alla.

Skal hann revsast so hart, aftaná at hava sýnt varsemi og stóra ábyrgd í meir enn hálva øld? Hetta er eisini út av lagi vánaligur familjupolitikkur, soleiðis at máa støði undan búskapinum og tryggleikanum hjá mongum barnafamiljum, ið júst hava bygt. Hvussu kunnu tey fáa mjólk og breyð á borðið, tá annar av forsyrgjarunum hevur eitt livibreyð, sum krevur eitt koyrikort? Eingin familjumaður fer at gera eitt ferðslubrot við fríum vilja! Hann hevur nógv at koma heim til aftur! Hetta er eisini vánaligur pedagogikkur at signalera til okkara ungu bilførarar, at mistøk gjørd í ósketni, verða revsaði ájavnt við ferðslubrot, sum eru gjørd við beráddum huga.

**Fyri fólkið ella?**

At enda fara undirritaðu starvsfólk í Postverki Føroya - ið liva av okkara koyrikorti - at heita á tykkum 32 løgtingsfólk um at gera eina ræ ttvísa ferðslulóg, ið setur sjónlig mørk millum óflýggjaskap og menniskjaslig mistøk! Spyrjast kann um vit skulu hava eina ferðslulóg fyri fólkið, ella eina ferðslulóg fyri bileftirlitið og koyrilærarnar? Vit eru mong ófaklærd ið eru í tí støðu at missa vit koyrikortið fyri eitt menniskjaligt mistak, ja so missa vit eisini livibreyðið!

Standið stinn tá tað ræður um at steðga óræ ttvísum lógum! Við tøkk fyri tykkara viðgerð!

*Við ræ ttvísiskvøðu:*
**Oddbjørn Joensen,
Erik Andersen,
Jákup Pauli Johansen,
Arnhold Fjallstein,
Magnus Samuelsen,
Heri Simonsen,
Ian Brockie,
Frank Petersen,
Jens Petur Andreassen,
Ingi Steffansson,
Heðin J. Luid,
Henry Fjallstein,
Álvur Danielsen,
Magnus M. Hentze,
Finnbogi Samuelsen,
Kaj Poulsen,
Einar Djurhuus,
Arnfríður Dam Jacobsen,
Petur Mortensen,
Rúni Ellingsgaard,
Niels P. Johannesen,
Heini Justinussen,
Jóan Pauli Hammer,
Karl Mortensen,
Bjartur Wacher,
Ib H. Mortensen,
Annfinn Reynheim,
Magnus Gunnarsson.**
***(Starvsfólk hjá Postverki Føroya, ið hava koyrikortið sum livibreyð!)***



## VIÐMERKINGAR

# Óneyðugt við lóg um fri skúlar

**Eyðólv Dimon**
*Hoyvík*



Seinasta leygardag hevði eg nakrar viðmerkingar til Skúlamálaráðharrin, tí hann fer at rumbla við uppskotið um lóg um frískúlar, nú samgonguskeiðið er runnið. Eg vísti á, at Fólkaskúlin ongantíð hevði fingið tað aftur, sum hann var spardur í kreppuárunum, hóast landskassin ongantíð hevði havt tað so gott sum nú. Men hinvegin so er nýggj fólkaskúlalóg farin at virka, og Lærarafelagið hevur fleiri ferð víst á, at nýggja fólkaskúlalógin kostar yvir 100 mio. at seta í verk. Hóast hetta, so er játtanin til fólkaskúlan bert hækkað 70 mio. meðan henda samgonga hevur sitið, so skúlin er spardur yvir 30 mio. kr., meðan henda samgongan hevur sitið.

**Hví frískúlar**

Við nýggju fólkaskúlalógini eru nærum óavmarkaðir møguleikar fyri, hvussu lærarar, næmingar og foreldur skipa skúlan. Einasta avmarkingin ella treytin er, at endamálsorðingin í fólkaskúlalógini verður fylgd. Endamálsorðingin snýr seg um, at undirvísingin og gerandislívið hjá skúlanum eigur at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði. Hví er so framvegis eitt ynski um at skipa frískúlar.

Fyrst eru tað teir átrúnaðarligu frískúlarnir, sum ikki eru sameiniligir við endamálsorðing fólkaskúlans um tollyndi og andsfrælsi, og hetta leggi eg ikki í at koma við fleiri viðmerkingum til her, tí hesir skúlar fara at koma føroyska fólkaræðinum afturum brekku, um teir sleppa at síggja dagsins ljós.

Hin orsøkin er, at fólkaskúlin ikki er tann skúlin, sum fólkaskúlalógin leggur upp til, tí játtanin til fólkaskúlan er ov lág. Fólkaskúlin gevur næmingunum allar møguleikar at velja sínar vallærugreinar og skipa sín skúla, men tá ynskini skulu fylgjast,tá eru ongir pengar, og skerdi skúlin er tí stirvin og langt frá tí, sum fólkaskúlalógin leggur upp til. Her er ikki tørvur á nýggjum lógum. Nei, um hetta skal betrast, so er at hækka játtanina til fólkaskúlan og ikki grugga málið, bert við tí endamálið at skøva útyvir vanstýringina av skúlanum, nú val stendur fyri durum.

**Tjóveldisflokkurin**

Arbeiðshátturin hjá Tjóðveldisflokkinum í hesi samgonguni er sera margháttligur. Tað tykist, sum hann hevur snorksovið, og nú tíðin fer at renna undan, so skulu kollveltandi broytingar setast í verk, og tað ørkymlandi er, hví broytingarnar skulu fremjast, nú teir fara úr Tinganesi. Eg fari at nevna nøkur dømi. Blokkurin er hækkaður, meðan Tjóveldisflokkurin hevur havt ábyrgd av fíggjarmálum, men nú teir eru á veg út gjøgnum hurðina, so skal blokkurin lækkast við yvir 300 mio. Einasta avriki hjá landsstýrismanninum í fullveldismálum er, at embætisfólkini hava skrivað ”Hvítu bók”, men nú, hann er á veg út gjøgnum hurðina, skal avgerð takast um yvirtøku av løgreglu o.s.fr. Fólkaskúlin hevur ligið í ”koma” við skerdari játtan og ongari eftirútbúgving av lærarum, meðan Tjóveldisflokkurin hevur havt skúlamálaráðharran, men nú teir eru á veg út gjøgnum hurðina, so skal lóg um frískúlar setast í verk.

**Fólkaskúlin verri fyri**

Elin Henriksen ger meg í Sosialinum fríggjadagin varugan við, at okkurt av tí eg havi skrivað um fríkúlaætlanirnar, ikki hevur verið nóg greitt, og tað fari eg at takka henni fyri og royna at betra.

Eg haldi tað vera púra burturvið at fara at gera eina lóg um frískúlar í Føroyum, og orsøkin er tann, at fólkaskúlin kann nøkta nærum óavmarkaði ynski frá lærarum, næmingum og foreldrum ella skúlastýrum. Harafturat fer ein frískúli at verða fíggjaður eins og í londunum uttanum okkum. Tað merkir at landskassin saman við einum foreldragjaldi skal gjalda skúlan. At landskassin skal gjalda sín part av skúlanum merkir, at játtanin til fólkaskúlan verður lækkað við somu upphædd, sum frískúlin/skúlarnar skulu hava. Hetta fer at gera føroyska fólkaskúlin verri fyri, enn hann longu er. Gev hinvegin føroyska fólkaskúlanum tað játtan sum krevst, so kann hann fylgja fólkaskúlalógini, og tá er óneyðugt við nøkrum frískúlum. Broyti politikkin frá at verða, at føroyska merkið er blivi hentleika flagg, sum Tjóveldisflokkurin hevur gjørt tað til, og lati Merkið hin vegin verða borgan fyri góðsku.

---

# Eitt mentunarval

**Signar P. Heinesen**



Val er í hondum og vit, sum skulu velja, gera okkum so smátt til at meta um, hvat kom burturúr hesum valskeiðinum, og hvat vit vilja skal henda í tí komandi.

Vit eru borgarar í tí lítla partinum av heiminum, sum hava demokratisk ræ ttindi. Við søguligum eygum eru hesi demokratisku ræ ttindi eisini so nýggj, at vit enn gera rætt í at handfara hesi ræ ttindi sum tað, ið kann gleppa okkum av hondum.

Veljarin hevur tí onga umbering fyri ikki at røkja hesi ræ ttindi eftir førimuni. Løgtingsvalið er mest týðandi stakhending í demokratisku skipanini, og er tað tí góður demokratiskur siður, at tann einstaki veljarin gevur sær stundir til at hugsa seg um, minna seg á tað, sum farið er og líta framyvir - hvar vil eg geva mítt demokratiska íkast?

**Hetta valskeiðið**

At sjálvstýrið føroya fólks hevur myndað yvirskriftir og røður hetta valskeiðið, er einki nýtt. Hóast nógv rok av ymsum slagi, so eru tey ítøkiligu úrslitini til at yvirskoða. Vit eru ikki nærri eini politiskari niðurstøðu í málinum, har nakar greiður meiriluti av Føroya fólki er fyri ella ímóti at taka sjálvstýri innanfyri eitt ásett áramál, hóast væl tey flestu helst kundu hugsað sær eitt sindur víðari ræsur. Onkur roynir at ugga seg við, at ein sjálvstýrisprosess er farin á glið og steðgast ikki aftur. Men veruleikin er, at tann helvtin av løgtinginum, sum argumenterar við skattapengunum hjá donsku frú Jensen, er eisini fólkavald.

Mentunarliga var støðan ikki serliga góð, tá ið hendan samgongan tók við. Men hendan samgongan hevur ikki bøtt um støðuna - heldur hinvegin. Í atgerðarloysi vegna tað eina málið fyri framman var hugsað ov lítið um mentunarligu fylgjurnar av øðrum málum, sum ofta koma undir heitið ‘smámál’. Sum eitt lítið innskot kann nevnast, at framtíðargranskarar sjáldan brúka tíð uppá stórmálini - tað eru úrslit frá nøkrum av dagsins smámálum, sum koma at mynda stórmálini í morgin.

Tað eru serliga tvey eyðkenni, sum eiga at ávara okkum, sum velja.

**Ósannindi**

Tað eina eyðkenni, sum eigur at ávara okkum veljarar, eru tey ósannindi, sum oftari og oftari koma frá okkara ovastu politisku leiðslu.

Verandi stýrisskipan er eitt tvíeggjað svørð, sum vit veljarar eiga at taka í fullum álvara. Hendan stýrisskipanin byggir á ta einu høvuðsfortreytina, at øll í almennum starvi, frá høgum til lágan, siga sum er og siga tað, sum er týðandi í málinum. Er onkur, sum tilætlað smoykir sær uttanum hetta, so eigur tað at fáa avleiðingar alt fyri eitt. Verður hetta ikki tikið í álvara, so er okkara stýrisskipan ein einaræðisskipan. Endalyktin er tað totalitera.

Hvussu ofta hava ikki bæði landsstýrismaður og hægstu embætisfólk hansara sagt beinleiðis ósatt ella borið mál soleiðis fram, at tann viðkomandi parturin tilætlaður er skúgvaður til viks? Dømið við einum av hægstu embætismonnum landsins, sum nú um dagarnar var í fjølmiðlunum við ósannindum fyri aðru ferð í sama máli at kalla, stendur ikki einsamalt í so máta. Tað er tekin um eina undirmáaða mentan, at bæði landsstýri og løgting góðtaka ósannindi.

Tann, sum brúkar ósannindi í síni talu og ósanna atferð, hevur meldað seg sjálvan úr samskiftinum við onnur og lítið felags gagn er í tí, sum viðkomandi tekst við. Tann alment setti, sum brúkar ósannindi í síni talu og ósanna atferð, forðar harafturat veljaranum í sínum politiska dómi og er tí sekur mótvegis einum av hornasteinunum í praktisku demokratisku skipanini.

**Ikki-politikkur**

Hitt eyðkennið í okkara stýring er vantandi evni og vilji til at gera tað politiska arbeiðið til lítar og grundað á hetta arbeiðið at fáa undirtøku fyri tí, sum verður avgjørt. Ein politisk avgerð, sum ikki hevur eina veruliga undirtøku, er ikkipolitikkur, sum er trýstur ígjøgnum politiska formalitetin, serliga tá ið talan er um bygnaðarmál. Slík mál hava ongan týdning í sær sjálvum, men eru avgerandi fyri hópin av øðrum málum. Kommunuskipanin er dømi um slíkt mál.

Júst kommunuskipanin er eitt av dømunum, har tað politiska arbeiðið so at siga steðgaði upp. Ongin breið tilvitan er fingin til vega í fólkinum um, at færri og størri kommunur eru til størri gagn enn fleiri smáar kommunur, hóast mong í fyrisitingini og kanska eisini fleiri politikarar halda, at so er. Tá ið so ongin tilvitan fæst, so verður málið trýst ígjøgnum við at leggja størri og størri byrðar á kommunurnar, soleiðis at tær noyðast at leggja saman. Tað gera tær so - sum best ber til. Tað ítøkiliga úrslitið er, at vit neyvan nakrantíð hava havt ógreiðari býtið millum land og kommunur. Vit kundu nevnt onnur dømi, har politiska skipanin roynir at smoykja sær uttanum veljaran, eitt nú innan skattaskipanina, sjálvstýristilgongdina, fíggjarlógarviðgerðina o.s.fr.

Sagt við øðrum orðum, so eru vit við at koma okkum í eina ‘vit látast sum um’ skipan, sum hevur lítið við skilagóða atferð at gera - enn minni við demokratiska atferð - og uppaftur minni hevur tað við mentaða atferð at gera. Hetta er ikki so mikið, sum frægasti mátin at fáa avgerðir praktiskt gjøgnumførdar.

**Ein spurningur um mentan**

Hesi málini eru um mentan. Gerandismentan, sum næsta ættarlið fer at skriva bøkur um. Málini snúgva seg um, hvussu vit eru mótvegis hvør øðrum, hvussu vit skipa okkum innanhýsis og í okkara livibreyði og hvussu okkara leiðsla virkar undir trýsti. Tað er mentanin, orðið, sum ger skilnaðin millum djór og menniskju, millum frumskógina, har tann sterkasti vinnur og fólkið, har felagsskapurin er kjarnin.

Mentan ger munin. Menniskjan hevur ymiskar møguleikar, sum djórini ikki hava. Menniskjan hevur t.d. eisini møguleikan, at planta eina frumskóg, har tann veikasti vinnur. Tá fáa vit eina doyggjandi mentan. Ein slík gongd er eyðkend m.a. við loysnum, sum verða settar í verk, hóast tær vóru framskygdar fyri áratíggjum síðani og tíðin nú er farin frá.

Tað er mentanin, sum ger av, um vit skipa okkum soleiðis, at sum frægast fæst burturúr tí einstaka borgaranum - og at hvør einstakur fær sum frægast burturúr tí tilveru, sum honum var lagað, saman við sínum medborgarum. Tað er mentanin, sum ger av, um vit heldur skipa okkum soleiðis, at tað veikasta vinnur frama í tí einstaka, og vit harvið máa undan ‘sam’-felagnum og fáa hissini menniskjaoyggjar, har títt problem ikki er mítt problem - ein gongd, sum er felagsskapinum at bana.

Tað er ikki stórvegis íkast eitt lítið land sum Føroyar kann geva í einum víðari høpi, men mentaða atferð og góðar demokratiskar siðir hava vit natúrligar fortreytir at geva. Sum veljari anno 2002 verður mítt demokratiska íkast at velja mentan. Ynski mítt er at fáa høvi at velja ein mentaðan persón í einum rímiliga mentaðum flokki, har teir ítøkiligu persónarnir í floksleiðsluni arbeiða rímiliga mentað millum sínar medborgarar.